Anne Walls umhvørvisserfrøðingur hjá Mobil:

Føroyska modellið brúkast aðrastaðni

-Tað er eindømi, at oljufeløg og stovnar í einum landi so tíðliga í eini oljumenning fara undir eitt so tætt samstarv sum GEM. Føroyska modellið kann blíva fyrimynd fyri onnur nýggj oljuøki úti í heimi í framtíðini heldur Anne Walls frá Mobil

JAN MULLER

Frá seminarinum, sum GEM skipaði fyri á Hotel Hafnia í farnu viku fyri umboðum fyri stovnarnar á Debesartrøð. Endamálið var at læra hvør annan at kenna og at kunna um oljuvinnuna. Mynd Jens K Vang

Hjalti í Jákupsstovu, stjóri á Fiskirannsóknarstovu her saman við Halvor Snarvold, formanni í GEM og Annie H. Walls, frá Mobil. Hon er leiðari í umhvørvisbólkinum

Í síðstu viku varð seminar á Hotel Hafnina, sum GEM-felagsskapurin skipaði fyri. Hetta er eitt samarbeiði millum oljufeløg og føroyskar granskingarstovnar.

Upprunaliga kom uppskotið til hetta samstarvið úr Føroyum og hevur tað víst seg, at oljufeløgini eru sera fegin um tað.

Oljufeløgini vilja við hesum samstarvi royna at kunna stovnar í Føroyum um, hvat henda vinnan snýr seg um, hvussu hon kann ávirka umhvørvið og vil tey við hesum fáa ein dialog í gongd millum stovnarnar og oljufeløgini um, hvussu felagssarbeiðið í GEM skal skipast.

Ætlanin við nýggja samstarvinum er at savna og skráseta verandi vitan fyri harvið at kunna fara undir eina trygga og umhvørvisvinarliga útbygging av eini oljuvinnu.

Sosialurin skilur, at ætlanin verður væl móttikin frá føroyskari síðu men hinvegin kann sigast, at stovnarnarir eru eitt sindur í villareið, tí teir eru ikki mannaðir til at taka sær av hesum.

Stovnarnir í Føroyum hava sum er verið undirmannaðir leingi, og her er so talan um nýggj fakøki, sum eisini krevja nógv meira av hesum stovnum. Stovnarnir hava ikki avlopsfólk ella útbúgvið fólk til hesar uppgávurnar, og tí verður helst neyðugt í størran mun at brúka útlendska arbeiðsmegi eisini.

Oljufeløgini hava brúk fyri føroyskari vitan og tilfari í sambandi við eina komandi oljuleiting, og hetta kemur tí at seta stór krøv til stovnarnar.

Fakfólk, sum Sosialurin hevur tosað við, leggja tó stóran dent á, at her er talan um eitt sera gott samarbeiði, sum føroyskir stovnar kunnu fáa nógv positivt burtur úr. Talan verður um ymisk granskingarprojekt.

Tað gevur so stovnunum á eitt nú Debesartrøð eina vitan, sum teir ikki hava havt.

24 feløg við

Í løtuni eru 24 feløg við í GEM. Eitt av feløgunum verður helst ikki við næsta ár. Møguleiki er tó fyri, at fleiri onnur feløg kunnu koma uppí sum fráliður.

Samarbeiðið er bygt upp á tann hátt, at ein stýringsnevnd stendur yvir øllum. Í henni eru umboð fyri øll tey 24 oljufeløgini og føroyskar stovnar. Síðani eru tríggir arbeiðsbólkar. Ein er fyri umhvørvi, ein fyri meteorologi og oceanografi og ein fyri geoteknikk.

Seminarið, sum GEM skipaði fyri á Hotel Hafnia í farnu viku, varð fyri umboðum fyri fleiri almennar stovnar og her serstakliga teir á Debesartrøð. Evnini, ið vórðu viðgjørd, snúðu seg um oljuvinnuna sum heild, um sambandið millum fiskivinnu og seismikk og um oljuboring.

Tað er sera gott at hitta føroyingar á einum slíkum seminari. Tí umframt at vit frá oljufeløgunum kunnu læra føroyingar at kenna, so fáa vit eisini eina fatan av, hvat hesi fólkini hugsa og halda. Men tað er eingin loyna, at vit eisini fegin síggja, at føroyingar vita og skilja, hvat vit í oljufeløgunum gera og hvat vit vita sigur Halvor Snarvold frá AMG-bólkinum. Hann er formaðurin fyri GEM hetta árið út.

Føroyska modellið brúkast aðrastaðni

Anne Walls er formaður í tí eina av arbeiðsbólkunum, nevniliga umhvørvisbólkinum. Hon starvast hjá oljufelagnum Mobil, har hon tekur sær av umhvørvisuppgávum.

Hon heldur GEM-samarbeiðið verða sera kærkomið fyri bæði oljufeløg og føroyska samfelagið. -Eg haldi eisini, at føroyingar eiga at vera einir av hesum samarbeiðinum, sum mær vitandi er tað mest umfatandi av sínum slag nakrantíð í oljuheiminum.

Hon sigur, at tað er vanligt, at kanska eini tvey oljufeløg taka seg saman og gera slíkar kanningar, men tað er so ongantíð hent áður í allari oljusøguni, at heili 24 oljufeløg so langt áðrenn eitt útbjóðingarumfar taka seg saman í einum slíkum samarbeiði við myndugleikar og stovnar í einum landi.

-Eg haldi, at hetta er eitt modell, sum umheimurin kann læra av og brúka. Soleiðis at tá farið verður undir oljuleiting í øðrum nýggjum økjum í heiminum, so er hetta føroyska modellið framúr gott at brúka.

Hon heldur tað eisini vera sera skilagott, at oljufeløgini longu nú koma saman og arbeiða við slíkum álvarsmálum sum umhvørvinum. Hetta gevur feløgunum møguleika at fáa vitan frá hvørjum øðrum, tað ger hetta arbeiðið bíligari og hetta er við til at tryggja, at oljuvinnan hevur sum minst negativa ávirkan á tað økið, sum oljufeløgini skulu arbeiða í.

-Eg haldi eisini, at tað er gott fyri Føroyar, at stovnar, myndugleikar og eisini vinnulívið her kann síggja, hvussu oljuídnaðurin arbeiðir.

Hvørji granskingarprojekt er so talan um at gera.

Anne Walls: -Vit eru longu farin í gongd við eitt projekt, sum snýr seg um sjófugl. Har royna vit at hyggja eftir sjófugli í teimum økjum, sum oljufeløgini hava við í síni fyribils nominatión, sum varð gjørd fyrr í ár. Vit hyggja eisini eftir, hvat verður gjørt við burturkastið her í oyggjunum m.a. við tí fyri eygað longu nú at gera sær greitt, hvat skal gerast við burturkastið frá boripallunum, sum fara at bora við Føroyar. Vit royna eisini at útbyggja BIOFAR-projektið, sum goymir eina rúgvu av upplýsingum longu nú. Og mangt annað.

Samfelagsárin

Vit spurdu Anne Walls um tað ikki hevði verið eitt gott hugskot, um arbeiðið hjá GEM ella hjá einum líknandi forum var víðkað til eisini at fevna um samfelagsligu ávirkanina, sum ein stór oljuvinna fer at hava á litla føroyska samfelagið?

-Hatta er ein sera áhugaverdur spurningur, sum eisini hevur verið reistur av fólki her á teimum seminarum, sum hava verið í GEM. Eg haldi hetta er týdningarmikið at taka upp. Spurningurin er so, um tað er GEM ella kanska eitt heilt annað forum, sum skal taka hetta upp.



Tvey av fólkunum á Fiskirannsóknarstovuni við á GEM-seminari í Havn

Sjónarmið

Ein føroysk fólkakirkja?

Er tað rætt at skipa eina fólkakirkju í Føroyum, sum eitt kopi av donsku fólkakirkjuni? Kanska er fólkakirkjan ein fornleivd, sum er søguliga avmarkað til tíðina eftir trúbótina?

Væntandi politiskt fantasi?

Nú er líkt til at tingið er fyri at yvirtaka fólkakirkjuna, sum er ytri karmurin fyri størsta partinum av kirkjulívinum í Føroyum (N.B.! Tað ber ikki til at yvirtaka hina heilagu almenn (heimsumfatandi) kirkjuna, tí hon *er og verður ein!*)

Uttan at taka støðu til tað, sum kanska verður orsøkin til at kirkjan "skal yvirtakast", so kann ein siga, at tað helst er ein natúrligur partur av menningini í viðurskiftunum millum Danmark og Føroyar, at føroyingar yvirtaka kirkjuna, soleiðis at skilja, at kirkjufólk í Føroyum sjálv gjalda tað, tað kostar at hava eina kirkju.

Sum er gjalda kirkjufólk fyri raksturin av kirkjuni, men ikki fyri prestalønir, sum koma úr Danmark. Og her kunnu vit skoyta uppí, at kirkjan í Føroyum er lutfallsliga fleiri ferðir bíligari í rakstri enn kirkjan í Danmark – sammett við t.d. Bornholm, er føroyska kirkjan einar tríggjar ferðir bíligari í rakstri, tí so nógv av arbeiðsorkuni í Føroyum er sjálvboðin.

Trupulleikin er her, sum so manga aðrastaðni, at vit automatiskt líta til Danmarkar, tá vit skulu finna ella kopiera eina loysn – vit sammeta okkum sum eina sjálvfylgju við Danmark og hvussu tey gera har. Men er tað rætt at hyggja til Danmarkar, tá kirkjufólkið í Føroyum skal taka alla ábyrgdina av síni egnu kirkju? Svarið er nei! Tað ber ikki til at samanbera átrúnaðarligu støðuna í Danmark og í Føroyum – í Danmark eru umleið 86,1% av fólkinum limir av fólkakirkjuni. Tey, sum ikki eru limir, eru flest øll beinleiðis ímóti kirkjuni, ella limir í øðrum trúarrætningum – hesi eru kanska bara eini 2%, restin eru rættuliga líkasæl.

Í Føroyum eru umleið 18-22% av fólkinum ikki limir av fólkakirkjuni – hesi eru ikki kristiliga líkasæl, men aktiv kristin í øðrum kristnum trúarbólkum. Afturat hesum, so eru hesi lutfalsliga væl umboðað í løgtinginum, so væl at atkvøða teirra lættliga kemur at verða avgerandi í øllum føroyskum fólkakirkjuviðurskiftum – ikki minst tá tað snýr seg um tað fíggjarliga.

Fólkakirkjan tann tíð tað var

Fólkakirkjuskipanin – ein kongur ein trúgv – hevur sínar røtur í samfelagsskipanini eftir trúbótina. Áður høvdu teir katólsku prinsarnir – erkabiskuparnir – størsta partin av veraldsliga valdinum. Eftir trúbótina vildu veraldsligu prinsarnir – kongar, fyrstar og hertogar – ikki bara hava veraldsliga valdið, men eisini valdið yvir sálunum. Hetta varð hildið at vera heilt náttúrligt tá, og tí fingu vit Landeskirchen, ella fólkakirkjur, har allir undirsátarnir í nýggju protestantisku londunum høvdu somu trúgv sum kongur ella fúrsti.

Í teimum londunum, har skipanin upprunaliga bleiv sett í verk, virkar hon hampuliga væl, og mangastaðni heilt væl. Men, tað merkir kortini ikki, at tað í 1997 er rætt at kopiera eina skipan, sum á mangan hátt er ein fornleivd, sum er ætlað einari aðrari samfelagsskipan og einari aðrari tíð.

Vit kunnu taka eitt annað dømi – einaferð var tað natúrligt, at ríkisovastaembætið varð arvað, at kongar ráddu fyri borgum. Hetta var so natúrligt, at tá t.d. Noreg fekk loysing frá Svøríki, so leitaðu teir sær til Danmarkar eftir einum prinsi, sum skuldi verða kongur yvir nýggja Noregi.

Men, tá Ísland seinni fekk fullveldi, vóru tíðirnar so nógv broyttar, at ongin hugsaði um at fara til Danmarkar – ella Svøríkis – eftir einum prinsi at stjórna landinum. Ísland fekk ein forseta, eins og Føroyar í dag høvdu valt ein forseta – undir heitinum løgmaður – um landið fekk fullveldi nú. Tað er rættuliga óhugsandi, at føroyingar í dag høvdu vent sær til Danmarkar og biðið Jákim um at verða kongur føroyinga. Kongsdømi er ein fornleivd – tað virkar væl, har tað virkar væl – men ongin hevði stovnað eitt kongsdømi í dag. Soleiðis er tað eisini við fólkakirkjuni!

Nýggjar tíðir, nýggjar loysnir!

Í nútíðarsamfelagnum er tað rættuliga ivasamt um kirkjulig initiativ í hesum sambandi skulu koma úr landsstýrinum, ella úr løgtinginum – hetta er gamla hugsanin. Hví skal ein partur av teimum trúgvandi verða lagdur undir løggávuvaldið, meðan hini hava fult frælsi til sjálv at avgera sína kirkjuligu skipan? Kirkjuligu initiativini *eiga* at koma úr kirkjuni – frá prestastættini og frá kirkjufólkinum.

Sum skipanin er, hevur biskupurin rættiliga avmarkað andaligt vald – kanska onki; og kirkjumálaráðharrin hevur als onki andaligt vald! Uttan sjálvandi, tað hann tiltuskar sær, sum umboð fyri ein bólk av samsintum. Og ein av størstu trupulleikunum í fólkakirkjuni er júst leiðslubygnaðurin, kommandostrukturin – hvør tekur avgerðir í fólkakirkjuni? Várharra ella tey, sum eru frekast og rópa harðast? Mangt bendir á, at tað seinna er tilfeldið, um vit ikki hava ein skipaðan leiðslu- og avgerðarbygnað.

Sum støðan er í Føroyum í dag, er løgtingið so sum bundið at kristnu siðalæruni, men annars neutralt, óheft konfessionelt – tað er frá teimum ymisku trúarrætningunum innan kristnu læruna. Søguliga og juridiskt er støðan sjálvandi ein onnur – men um løgtingið ikki kann diktera brøðrasamkomuni ella hvítusunnusamkomuni, enn minni katólsku meinigheitini teirra kirkjuskipan, hví skulu atkvøður frá hesum trúarbólkum so medvirka í avgerðum fólkakirkjuni viðvíkjandi?

Spyr kirkjufólkið!!!

Um so er at ministarin, løgtingsmenn ella klerkar ætla sær at broyta galdandi viðurskifti millum kirkjuna í Føroyum og kirkjuna í Danmark, so eiga tey fyrst og fremst at spyrja prestarnar og kirkjufólkið um hesi ynskja at

støðan verður broytt. Føroyska kirkjan hevur hvørki brúk fyri andaligum diktaturi úr løgtinginum, Tinganesi ella úr Jóannes Paturssonar gøtu. Kristindómurin er og verður aldrin ein spurningur um meirilutaavgerðir – men í einum nýtímans, einum framkomnum kirkjulívi, er tað skeivt – ja, beinleiðis mannminkandi, ikki at spyrja brúkaran, vanliga kirkjugangaran, hvat hesin hugsar.

Loysing merkir totalábyrgd!

Tað, sum kirkjumálaráðharrin hevur í huga er helst, gamla føroyska niðurlagið: í Føroyum skulu føroyingar ráða, og danir gjalda. Men skulu føroyingar hava sína egnu fólkakirkju, so noyðast teir sjálvir at gjalda, alt annað er mannminkandi tvætl!!! Og í sambandi við eina slíka yvirtøku, so skulu kirkjufólk/politikarar gera sær greitt, at neyðugt verður at líkna einar 8-10 milliónir krónur út á limirnar í fólkakirkjuni í Føroyum. Tað er sjálvandi heilt órimuligt at vænta at onnur enn fólkakirkjulimir skulu gjalda fyri kirkjuna í Føroyum.

Ein loysing frá donsku fólkakirkjuni ber eisini við sær, at føroyska kirkjan – prestar og kirkjufólk – mugu finna saman um ein bygnað, sum er hóskandi til føroysku kirkjuna í dag og framyvir; og sum er hóskandi í einum landi, har í minsta lagi 20% av fólkinum eru limir í øðrum trúarbólkum.

Ein fyribils loysn hevði verið, at kirkjan fær loyvi til at líkna rakstur og lønir á limirnar í føroysku kirkjuni, at skipað verður fyri einari synodu – á einum kirkjufundi, har prestarnir eiga helvtina av limunum, og umboð fyri kirkjuráðini hina helvtina, meðan biskupurin, og í hansara stað dómprósturin eiga avgerandi atkvøðuna. Síðani skal kirkjan koma við uppskoti um at loysa kirkjuna frá løgtinginum, og um bara at verða stýrd hagani í tann mun, øll onnur trúarfeløg verða at.

Kirkjumálaráðharrin hevur kanska ikki gjørt sær stórvegis hugsanir um ekklesiologi – vónandi hava klerkarnir gjørt tað! Men eitt megnar ráðharrin og løgtingið kortini ikki, og tað er at loysa ekklesia, kirkjuna, frá Várharra – smálutirnar leggur hann kanska ikki so nógv í!

Tað hevði helst verið hóskandi, um tey, sum skulu taka hesar avgerðirnar, líta til Svøríkis, har samtykt er at skilja kirkjuna frá statinum – m.a. tí at støðan har líkist teirri føroysku, orsakað av mongu fríkirkjunum í Svøríki.

Og fyri Guds skyld, gerið ikki framtíðina hjá føroysku kirkjuni til eina »hovsaloysn« áðrenn næsta val!

Bergur Jacobsen

Fyrilestur umborð á Høganesi

Mánakvøldið 20. okt. kl. 20.00 heldur Tórður Jóansson fyrilestur umborð á sluppini »Høganes« í Runavík. Heitið er »Bretsk lánorð í føroyskum máli«.

Tórður Jóansson, doktari, sigur frá arbeiðinum við at finna fram til, hvørji orð eru komin uttaneftir inn í føroyska málið. Kanningin fevnir um tíðarskeiðið miðøld til nútíð (sluppir og trolarar). Fyrilesturin verður hildin á ein óformellan hátt og soleiðis at eisini ikki-fakfólk skulu fáa nakað burturúr.



Sum flestu sjómenn og føroyingar annars vita, eru nógv orð umborð á skipi tikin beinleiðis úr enskum máli. Hetta hevur serliga verið galdandi fyri sluppir og trolarar (t.d. »skailett« »stíma«, »veirar« »sjórast« osfr.). Men Tórður Jóansson hevur við granskingarstarvi sínum víst á, at føroyska málið eisini langt áðrenn hetta hevur fingið lánorð frá fremmandum sjófólki og øðrum vitjandi. Tí hevur nevndin fyri Felagið Høganes hildið tað vera spennandi at hoyra nærri um forvitnisligu úrslitini hjá Tórða. Vit hava í samráð við Tórða mett bølini umborð á Høganesi at vera vælegnað til júst eitt høvi sum hetta, har nomið verður við hvussu skipini eisini bóru ORÐ millum lond. Fyrilesturin skal ikki verða nakur háfloygd teoretisering, men er sum nevnt eisini ætlaður vanligum fólki. Aftan á verður høvi at keypa ritgerðina hjá Tórða »English loanwords in Faroese«, og at fáa hana signeraða, um tað er ynskiligt. Henda bók er júst útkomin, og kemur ein føroysk umseting einaferð í vetur.

Felagið Høganes verður sostatt eisini á henda hátt við til at markera, at Føroyar aftur hava fingið ein doktara í málfrøði. Báðir teir fyrrverandi – Jacob Jacobsen og Chr. Matras – eru sum kunnugt ikki longur foldum á.

Skráin fyri kvøldið sær annars soleiðis út:

1) *Kl. 20.00 stundisliga:* Vælkoma og stutt frágreiðing um sluppina Høganes.
2) Tórður Jóansson, doktari, greiðir frá granskingararbeiði sínum, um innihaldið í doktararitgerðini og eitt sindur um arbeiðsháttin.
3) Brot úr sjónbandi frá doktara-tilnevningini 8. juli 1997.
4) Kári Sverrisson syngur og spælir 2-3 skotskar sangir.
5) Kaffi, te & køkur; óformligt prát.
6) Umleið kl. 22: endi, søla og dedikatión (signering) av bókini »English loanwords in Faroese«